## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Um kvøldið støkkur hann vesturum til útsynning og ælingur. Hitin millum 12 olg 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudag:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Sum vindurin blæsur

**Hóast vindurin sum orkukelda langt síðan hevur mist sín týdning, verður hann kortini hvønn dag nýttur sum áliti á sjónum. Til stuttleika. Í vikuni fylti hann eitt føroyskt vadmalssegl á einum áttamannafari**

SIGLING
*Edvard Joensen*



Lotið fyllir dúkin, sum spennir seg út og spakuliga fær báturin ferð á og glíður ljóðleyst eftir sjónum. Teir taka dragið og skeytið, og maðurin í rongini tekur stýrisvølin og leggur bátin so nær vindinum, sum hann kann. Og so er bara at halda kósini og njóta løtuna.

Løtan er í grundini søgulig, siga tey, sum fyri ferðini standa. Seks systkin av Eiði, sum hava gjørt eitt vadmalssegl saman við sjeyndu systrini og faðirinum, sum ikki eru á lívi, nú seglið verður royntt.

Hett er vist tað einasta seglið av sínum slagi í landinum í løtuni, so vítt tey vita, siga tey. Gjørt úr føroyskari ull, alt sum tað er.

Gamli faðirin, sum á ellisárum stytti sær stundir við rokkin, varð biðin um at spinna tógv til eitt vadmalssegl, sum latast skuldi bátasavninum í Roskilde í Danmark. Hann spann grátt. Men danir vildu hava hvítt. So tógvið fór ongantíð av hondum hins gamla.

Í staðin tóku døturnar við og hava síðan vovið og og seymað seglið, sum gjørt er eftir gomlum máli.

Seinni eru brøðurnir so komnir uppí og hava verið við til at gera seglið liðugt.

Í vikuni varð seglið roynt við áttamannafarinum Hvalinum, sum Eiðis Fornminnisfelag eigur. Báturin er smíðaður eftir gomlum málum, og passaði seglið væl til hansara.

Tey, sum gjørt hava seglið og eftir eru á lívi, vóru øll í bátinum hendan dagin, og latið varð væl at.

Sum skiltist á teimum er áhugi fyri seglinum millum onnur, ið hava til stuttleika at sigla í frítíðini.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 13 |
| Saint John's | 23 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 32 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 42 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 15 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. sunnan fyri Føroyar fer móti Íslandi og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Írska Havinum fer spakuliga norðureftir og verður við Føroyar leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/07 kl. 06[00]– 24/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 23/07 kl. 06[00]–24/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 54,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. juli | 04.28 | 16.50 | 03.28 | 15.50 | 03.43 | 16.05 | 06.28 | 18.50 | 07.28 | 19.50 | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 04.13 | 16.35 | 05.28 | 17.50 |
| 26. juli | 05.13 | 17.36 | 04.13 | 16.36 | 04.28 | 16.51 | 07.13 | 19.36 | 08.13 | 20.36 | 03.28 | 15.51 | 02.28 | 14.51 | 05.28 | 17.51 | 06.28 | 18.51 | 04.58 | 17.21 | 06.13 | 18.36 |
| 27. juli | 06.01 | 18.26 | 05.01 | 17.26 | 05.16 | 17.41 | 08.01 | 20.26 | 09.01 | 21.26 | 04.16 | 16.41 | 03.16 | 15.41 | 06.16 | 18.41 | 07.16 | 19.41 | 05.46 | 18.11 | 07.01 | 19.26 |
| 28. juli | 06.51 | 19.16 | 05.51 | 18.16 | 06.06 | 18.31 | 08.51 | 21.16 | 09.51 | 22.16 | 05.06 | 17.31 | 04.06 | 16.31 | 07.06 | 19.31 | 08.06 | 20.31 | 06.36 | 19.01 | 07.51 | 20.16 |
| 29. juli | 07.40 | 20.05 | 06.40 | 19.05 | 06.55 | 19.20 | 09.40 | 22.05 | 10.40 | 23.05 | 05.55 | 18.20 | 04.55 | 17.20 | 07.55 | 20.20 | 08.55 | 21.20 | 07.25 | 19.50 | 08.40 | 21.05 |

5 707265 100050 >